FISKIMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

21. januar 2022
Mál: 22/00824-2
(at tilskila í svari)

Tygara skriv: 52-110/2021

**Svar til fyrispurning 52-110/2021 frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, um Veðurstovu Føroya**

**Spurningar:**

1. Nær verður Veðurstova Føroya staðsett á flogvøllinum í Vágum?
2. Er ætlanin at skipa veðurstovuna í tríggjar eindir?
3. Er ætlanin, at eindirnar skulu skipast á flogvøllinum í Vágum, í Tórshavn og í Klaksvík?

**Svar:**

Eg loyvi mær at svara øllum spurningum undir einum.

Ein veðurmenningarbólkur lýsti og viðgjørdi málið í eitt tíðarskeið. Í apríl 2019 lat bólkurin landsstýrismanninum tilmæli og frágreiðing um eina dagførda veðurtænastu. Frágreiðingin er tøk á heimasíðuni hjá Fiskimálaráðnum.

Bygnaðarliga er veðurtænastan nú skipað undir stovninum "Vørn".

Í 2021 byrjaðu tveir veðurfrøðingar á Veðurstovu Føroya, og 1. januar 2022 byrjaði ein deildarleiðari. Ætlandi verður veðurmenningarbólkurin tøkur til ráðgeving eina tíð afturat.

Samanumtikið kann sigast, at tað bara eru fáir dagar síðani, at Veðurtænastan varð mannað við deildarleiðara. Tá ein tíð er frá liðin, fari eg at taka upp samband við partarnar á økinum, sum eru leiðslan á Vørn, deildarleiðarin á Veðurstovu Føroya umframt umboð fyri veðurmenningarbólkin. Endamálið við hesum skal vera at fáa partarnar, og ikki minst júst setta deildarleiðaran, at lýsa virksemið og allar tættir hesum viðvíkjandi - ítøkiliga eins og eini góðari breidd.

Tá umrøðan og viðgerðin við viðkomandi partar er liðug, verður niðurstøða løgd í málið viðvíkjandi skipan og framhaldandi menning av tænastuni, herundir eisini einari skynsamari staðseting av veðurtænastuni.

**Árni Skaale**
*landsstýrismaður*